# K@T@-hornið

Nr. 2 · hósdagur · 23. mars 2000 · 74. árgangur

**Tíðindablaðið Sosialurin,** Postboks 76, 110 Tórshavn, Telefon 311820, Telefax 314720 • **T-postur til KT-hornið**: kthornid@sosialurin.fo • **Lýsingar**: lysing@sosialurin.fo • **Ábyrgdarstjóri**: Jan Müller
**Blaðstjórn:** Steinbjørn í Dali, Finn Jensen • **Layout og uppseting:** Tíðindablaðið Sosialurin • KT-hornið er fastur táttur í Sosialinum hósdag • Evsta mark fyri lýsingar er mánamorgun kl. 10.00.


## Innihald


Síða 1. **Grein úr søguni hjá Alnótini.**
**Eitt søguligt yvirlit yvir gongdina hjá Internetinum** frá byrjan í 1967 til okkara dagar.
**Tíðindastubbar.**

Síða 2. **Ólavur Ellefsen, stjóri á VIT Sp/f skrivar grein** sum hann kallar "Sjey tiltøk at menna føroyska KT-vinnuni", har hann viðger, hvat skal til fyri at menna KT-vinnuna í Føroyum.
**Spurnakassi**. Lesari spyr um Windows 2000. Niels John Andreasen frá VIT Sp/f. svarar.

Síða 3. **Grein um Windows 2000.**
**Tíðindastubbi.**

Síða 4. **Heimasíðu ummæli** hesa ferð er um heimasíðuna hjá Toll- og Skattstovu Føroya.
**Prískanningin** hesuferð er um Microsoft Office pakkan.
**Káta Hornið** við eini skemtisøgu.
**Topp-10 listin.**



Finn Jensen


Steinbjørn í Dali

## Úr søguni um Alnótina - *Leitibúnaður*



**1969**
Grundarlagið fyri tí vit í dag nevna Alnótina, verður lagt hin 2. januar 1969 av tí amerikanska Tryggingarstovninum, ið nevnist **ARPA** (Advanced Reasearch Projects Agency), ið hoyrir til amerikanska verjumálaráðið, **DoD** (Department of Defence).

ARPA ger eitt granskingarkervi ið nevndist **ARPANet**. ARPANet skapar eitt kervi (infrastruktur) við ambætara og sjálvkonfigurerandi routarum, har data kunnu koma fram gjøgnum ymsar sonevndar rutarar, treytað av hvørjar íbindingar eru tøkar tá dataflutningurin fer fram.

Endamálið við verkætlanini er at gera teldurnar, ið eru íbundnar, minni viðkvæmar móti hernaðarligum álopum.

Tað er hendan verkætlanin, ið seinni mennist og verður til tað vit í dag nevna Internetið.

**1982**
Amerikanska verjumálaráðið mennir og velur **TCP/IP** sum standar.

**1990**
**Tim Berners-Lee** mennir **HTTP** (Hyper Text Transfer Protocol) skipanina, og hervið byrjar tað, vit kenna sum *World Wide Web*, eisini nevnt *Heimsnetið* á føroyskum. Tim Berners-Lee ger eisini fyrstu forritini til Alnótina. Talan er partvís um ein servara, ið skal geva data, og partvís um eina, ikki serliga framkomna, teldu til at lesa data'ini. Hetta er heimsins fyrsti *browsari*, ella *leitibúnaður* í finst. Seinni komu fleiri:

- Tekst-búnaðurin Lynx, ið verður gjørdur á lærda háskúlanum i Kansas, USA
- Viola-búnaðurin, sum Pei Wei mennir
- Ein leitibúnaður, ið Berners-Lee sjálvur ger til Next teldur

Felags fyri allar leitarnar sum hoyrdu til fyrsta ættarliðið, er at teir bert kundu vísa tekst — myndir og ljóð eru framvegis fram-tíðardreymar.

**1991**
Amerikanska verjumálaráðið tekur seg út úr Internet samstarvinum, og fer í staðin í gongd við at byggja eina afturlætna skipan ið nevnist MilNet. Í hesum sambandi setir amerikanska stjórnin avmarkingarnar fyri vinnuligari nýtslu av netinum úr gildi.

Internetið blívur síðani rikið av útbúgvingarstovnum við øktari vinnuligari luttøku.

**1993**
Fyrstu browsarnir, ið eru førir fyri at vísa myndir koma á marknaðin. Tann best umtókti er óiva Mosaic-browser frá NCSA. Mosaic er ikki tann fyrsti, ið er mentur at vísa myndir, men tann fyrsti ið kann arbeiða á fleiri sonevndum telduplatformum. Áðrenn var bert møguligt at nýta slíkar á Unix-teldum. Mosaic fæst í ymsum útgávum, millum annað til Unix, Eginteldur (PC) og Macintosh teldur. Lykilin til Mosaic er seinni seldur til millum aðrar Netscape og Microsoft.

**1994**
Fyritøkan Netscape Communications Corporation kemur upp í leikin, og teirra leiti, Navigator, er skjótt meira nýttur enn Mosaic. Netscape Navigator er tøkniliga langt frammanfyri aðrar á marknaðinum, og verður ein fyrimynd fyri tøkniliga standardin á heimsnetinum (WWW).

Fyri fyrstu ferð eru tað forritini, ið eru frammaligari enn sjálvt netið tøkniliga, soleiðis at nú verður arbeitt við at fylgja tøknini hjá Netscape Navigator upp, meðan tað hevði verið øvugt frammanundan.

**1995**
Microsoft kemur við síni útgávu, Internet Explorer. Í fyrstu syftu er Explorer eitt einfalt og nærum ónýtiligt forrit. Men teir á Microsoft arbeiða skjótt, og við 3,0 útgávuni kemur Microsoft við eini álvarsamari hóttan móti Netscape Navigator, ið higartil hevði verið at kalla einaráðandi í eina tíð.

**1996**
Netscape og Microsoft aðrar útbjóðarar út av marknaðinum, og fleiri enn 90% av surfarunum nýta annaðhvørt Netscape Navigator ella Microsoft Internet Explorer.

Hvítu Húsini í Washington koma við eini ábending um sonevnda "Next Generation Internet". Stjórnin ímyndar sær eitt kerv, ið er millum 100 og 1000 ferðir skjótari enn dagsins Alnót, og við nógv fleiri møguleikum.

Eitt víðgongt álit um nýggju ætlanina, ið millum annað boðar frá eini ørgrynnu av nýggjum tøkniligum hentleikum, ið eftir ætlan kemur at merkja nýggju øldina, er lagt á alnótina.

**1997**
Kríggið skal støðga. Bæði Netscape og Microsoft velja at beina leitibúnaðin burtur sum sjálvstøðugt forrit. Við Internet Explorer 3.0 fekk Microsoft Netscape aftur, og við 4.0 útgávuni er talan um heimsins besta leitiamboð, og somuleiðis er talan um heimsins mest framkomnu stýrisskipan, við sameiningini millum Internet Explorer og Windows 95.

Microsoft Internet Explorer og Windows stýriskipanin eru í dag samantengdar eindir, meðan líkt er til at Netscape við 4,0 útgávuni fer at miða eftir Intranet heldur en Internet.

Søgan um Alnótina og mangt annað finst her:
**http://www.keld.dk/webstudie/index.htm**

Upplýsingar um nýggja álitið er á:
**http://www.iitf.nist.gov/documents/press/internet.htm**

**Skrivað:**
**Finn Jensen**
**e-mail: finn@sosialurin.fo**

## Smátíðindi

### Sviar keypa Jubii



Tríggir ungir danir, ið fyri nøkrum fáðum árum síðan gjørdu heimasíðuna Jubii.dk, kunnu í dag av álvara rópað Juuuubiiii. Hósdagin í farnu viku var almannakunngjørt at svenska fyritøkan Spray, sum hevur líknandi leititeldu sum Jubii, helst ferð at keypa øll partabrøvini í alnótufyritøkuni Jubii. Hetta er í samband við at Spray verður skrásett á svenska keypskálanum (børsinum) seinni í ár.

Prísurin sviar skulu lata fyri partabrøvini er ikki kunngjørdur, men óheftar keldur hava mett at virði á fyritøkuni er umleið ein hálv milliard krónur. Helmingurin av søluupphæddini fer til teir tríggjar teldusnillingarnar aftanfyri Jubii — Thorborg, Henrik Sørensen og Kasper Larsen — meðan restin fer til menningarfyritøkuna Dico.

### 10 milliardir fyri en lítlan "dippedutt"

Næststørsta IT fyritøkan í heiminum, Intel, fer at keypa lítlu donsku fyritøkuna, Giga, fyri knappar 10 milliardir krónur. Sambært Politikken, er hetta triðstørsta sølan nakrantíð, tá talan er um sølu av donskum fyritøkum. Einans statsliga sølan av Tele Danmark, og yvirtøkan hjá Unibank av Merita Nordbank (ella øvugt), eru størri handlar enn omanfyri umrøddi.

Intel skal gjalda 9,7 milliardir fyri uppfinningina av einum hátti at fáa internetið at arbeiða skjótari. Tað var NKT í stovnaði Giga, ið spakuliga hevur ment eina tøkni, ið kann fáa fýra ferð so nógv data gjøgnum telefonkervið, enn møguligt er í dag.

Fýra stórir partaeigarar og umleið 100 starvsfólk í Giga skulu býta 10 milliardir krónur millum sín. Eigarnir eru, Lønmodtagernes Dyrtidsfond, Dansk Kapitalanlæg, Dansk Erhvervsinvestering og NKT Holding. Hesir seinastu eru einamest kendir fyri teirra kaðalar og seymir.

### Enn ein donsk KT-søla til útheimin.



Ein donsk fyritøka við umleið 20 starvsfólkum — prísur: Ein lítil hálv milliard krónir. Hetta er seinasta keypið hjá stórfyritøkuni Texas Instruments. Við í posanum fylgja rættindini til ein digitalan gullklump, sum tikið verður til.

Talan er um manglandi brikkin, fyri at fáa pusluspælið liðugt. Hetta sigur í øllum førum Harry Davoody, ið er næsthægstur hjá amerikanska KT-risanum, Texas Instruments, um fundið. Og tískil hevur hann valt at grópa djúpt í lummunum, fyri at fáa hendur á hesum gullklumpi. Intel er annars heimsins kendasti framleiðari av teimum sonevndu gerlunum (prosessorunum), ella tí vit í dag kunnu rópað heilin í eginteldun.

### Óttast KT-partabrævafall

Óvanligu hækkingarnar fyrr í ár á partabrævamarknaðinum - væl stuðla av KT-partabrøvunum — hevur vakt ans í heimsins tjóðbankum. Serliga er tað eitt bráðligt fall í KT-partabrøvum, sum hevur verið til umrøðu í seinastuni.

Í ársfrágreiðingini hjá danska tjóðbankanum, verður hetta umrøtt, av Nationalbankastjóranum, Bodil Nyboe Andersen, ið ikki dylir yvir, at hetta hevur vakt miklan ans í danska sentralbankanum.

### Nýggja virusið staðfest í Føroyum

Í seinasta KT-horninum skrivaðu vit um eitt sera vandamikið telduvirus, sum leggur seg í teldupost og kann gera stóran skaða. Tá vistu vit ikki um nakran tilburð í Føroyum. Ein lesari hevur nú boðað frá at hansara telda bleiv smitta av omanfyrinevnda virus fyri stuttum. Skaðin varð so stórur sum hann kundi verða.

Alt í harðdiskinum bleiv sletta og hann stóð á berum.

Vit vilja tí endurtaka ávaringina.

Virusið er ein variantur av "w32/prettypark.worm", sum fyrstu ferð sá dagsins ljós í juni mánaða í fjør.

Tey sum brúka Outlook Express skulu verða varin og serliga hyggja eftir um innihaldið í evnilinjuni er "C:/coolprogs/prettypark.exe".

Vilagda fílan kallast "Prette park.exe" ella í summum førum "Pretty~1.exe".



# Sjey tiltøk at menna føroyska KT-vinnu

*Ólavur Ellefsen, stjóri á VIT Sp/f:*

**Tá framtíð Føroya verður havd á lofti, verður KT-vinnan ofta tikin fram sum frelsandi eingilin, sum skal gera føroyskt vinnulív meira fjøltáttað. Í nógvum førum hava fólk als ikki gjørt sær greitt, hvussu støðan er í KT-vinnuni og hvat krevst, fyri at hon skal gerast ein týðandi búskaparligur táttur. Niðanfyri er greitt frá sjey tiltøkum til tess at menna føroyska KT-vinnu.**


*Ólavur Ellefsen, stjóri á VIT Sp/f*

**Ein málsetningur hjá føroyskari KT-vinnu eigur eftir mínum tykki at vera:** at gerast ein týðandi búskaparligur táttur í føroyska samfelag-num. Hvussu týðandi KT-vinnan er, kann t.d. mátast sum samlaði útflutningurin av KT úr Føroyum ella sum samlaða búskaparliga íkastið frá KT-vinnuni.

Taka vit fyrst KT-útflutningin og samanbera okkum við Danmark ella Ísland, so átti føroyski útflutningurin av KT at verið um 200 til 300 mió krónur árliga. Mær vitandi er føroyski KT-útflutningurin niðanfyri 3 mió kr. So her kann ikki sigast annað enn, at langt er eftir á mál.

Búskaparliga íkastið frá KT-vinnuni á bruttotjóðarúrtøkuna (BTÚ) meti eg til uml. 120 mió kr um árið, ella 1,7% av BTÚ. Eg kenni ikki neyvu tølini úr Danmark ella Íslandi, men haldi meg vita, at tey eru munandi hægri - eisini lutfalsliga. Um 8.000 fólk arbeiða í íslendsku KT-vinnuni, og lutfalsliga skuldi tað merkt, at uml. 1.600 fólk arbeiddu í føroysku KT-vinnuni. Talið er umleið 350 í dag, og tá eru starvsfólkini hjá Føroya TELE meira enn helvtin.

**Tiltak 1:**
**KT-háskúli**
Sum bæði eg og onnur hava meylað upp í saman, er ein føroyskur KT-háskúli fortreytin fyri eini føroyskari KT-vinnu av týdningi. Á KT-háskúlanum skulu føroyingar og útlendingar kunna nema sær master- og ph.d. útbúgvingar innan KT og kunna granska innan KT. Tað er ein royndur lutur bæði í Danmark, Íslandi og Silicon Valley, at KT-vinnan mennist í umhvørvinum rundan um KT-háskúlar. Lutvíst tí háskúlin framleiðir fólk við neyðugu førleikunum og lutvíst tí at granskingarumhvørvið á háskúlunum gevur fyritøkunum íblástur til nýggja tøkni og forrætningsmøguleikar.

Eftir mínum tykki er tað alneyðugt, at ein tílíkur KT-háskúli fevnir um útbúgving og gransking innan bæði verkfrøði og handil. Tískil átti hann at verið skipaður í einum samstarvi millum Fróðskaparsetur Føroya og Føroya Handilsskúla, sum bæði hava fleiri ára royndir við útbúgving innan hesi fakøki á universitetsstigi.

**Tiltak 2:**
**Klekingardeplar**
Skal ein føroysk KT-vinna blóma, er neyðugt at stimbra tey, sum hava hug og evnir at fremja nýggj KT-hugskot í verki. Vøksturin kann sjálvsagt koma í verandi virkjum, men royndir aðrastaðni vísa, at veruliga nýskapanin kemur úr nýggjum feløgum. Til tess at stimbra íverksetarar, eru aðrastaðni stovnsettir sonevndir klekingardeplar (en: incubators), har nýggjar fyritøkur fyri ein bíligan penga kunnu leiga eina lítla skrivstovu og hava atgongd til ráðgeving, teldur, internetsamband, kopimaskinu, fundarhøli, kantinu og so framvegis. Tað skal vera lætt og ómakasleyst at koma í gongd.

Klekingardeplarnir eru vanliga eginfíggjaðir, men allarhelst verður neyðugt við stuðuli frá almennari /privatari síðu at fáa depilin settan á stovn.

**Tiltak 3: KT-framtaksgrunnar**
Framtaksgrunnur Føroya hevur longu nú arbeitt við fleiri KT-verkætlanum, og hugurin og viljin hjá grunninum at seta pening í KT-fyritøkur sýnist at vera stórur. Framtaksgrunnurin er tó bundin av sínum viðtøkum, sum siga, at grunnurin í mesta lagi kann eiga 50% av eini fyritøku. Ein KT-fyritøka, sum ætlar at gera um seg á altjóða marknaðinum, krevur nógvan eginpening (5-10 mió kr) so at siga beinan vegin, og tað er órealistiskt at krevja av vanligum íverksetarum, at teir kunnu diska upp við fleiri milliónum úr egnum lumma.

Ein loysn kundi verið at viðtøkurnar hjá Framtaksgrunninum gjørdust linari, men eftir mínum tykki hevði tað verið uppaftur betri, um aðrir framtaksgrunnar vóru stovnsettir í Føroyum. Tað kundi t.d. verið Føroya Banki og Føroya Sparikassi sum í felag stovnaðu ein KT-framtaksgrunn, og tað kundu eisini verið donsk, svensk ella íslendsk framtaksfeløg (en: Venture Capital Firms), sum stovnaðu deild í Føroyum. Treytin fyri at fáa útlendsk framtaksfeløg til Føroya er tó sjálvsagt, at áhugaverdar KT-verkætlanir eru at seta pening í, og tí mugu hini tiltøkini setast í verk fyrst.

**Tiltak 4:**
**Privatisering av almennum KT-uppgávum**
Flestu brúkararnir av KT í Føroyum í dag eru á almennum stovnum og stýrum. Tað hevði styrkt um KT-vinnuna, um tað almenna í staðin fyri at lata egin starvsfólk taka sær av KT-uppgávunum, valdi at bjóða uppgávurnar út til KT-fyritøkurnar. Hetta verður lutvíst gjørt í dag, men tað átti at verið gjørt meira og eftir skipaðum útboðsmannagongdum.

**Tiltak 5:**
**Venda eygunum hjá føroysku KT-vinnuni úteftir**
Føroyska KT-vinnan hevur seinastu árini havt úr at gera at nøkta tørvin á heimamarknaðinum, og tí hevur lítið verið gjørt við at selja skipanir og tænastur uttanlands. Tað sýnist tó sum um vend er við at koma í, og fleiri KT-fyritøkur arbeiða nú seriøst við útflutningi. Eitt hugskot hevði verið, at KT-fyritøkurnar tóku lógvatak saman og samskipaðu útflutningstiltøkini. Hetta kundi verið gjørt við felags luttøku á útlendskum KT-messum, fyriskipan av námsferðum til útlendsk KT-umhvørvi, luttøku í millumtjóða KT-felagsskapum o.s.fr.

**Tiltak 6:**
**Netverkssamstarv**
Føroyska KT-vinnan hevur brúk fyri samstarvi við allar tættir í føroyska samfelagnum, og aðrastaðni hevur man góðar royndir av meir og minni skipaðum netverkssamstarvi. Í Karlskrona í Svøríki er netverkssamstarvið skipað við trimum samstarvspørtum: KT-vinnan, KT-háskúlin og tað almenna. Saman skipa tey fyri menning og marknaðarføring av Karlskrona (eisini nevnt Telecom City) sum KT-øki, samstarvi við onnur KT-øki, rekruttering av nýggjum starvsfólkum frá háskúlum aðrastaðni í Svøríki o.s.fr. Ongin sigur, at vit skulu brúka júst sama frymil í Føroyum, men eg kundi ímyndað mær, at nakað líknandi hevði riggað.

**Tiltak 7:**
**Neyv hagtøl um føroyska KT-vinnu**
Sum greitt frá í innganginum, so er langt eftir á mál, áðrenn sigast kann, at føroyska KT-vinnan er ein týðandi táttur í føroyska búskapinum, men royndir úr eitt nú Íslandi vísa, at er man komin í gongd, so kann tað ganga rættiliga skjótt fyri seg. Um vit seta nakrar málsetningar fyri eitt nú KT-útflutning ella ávirkan av KT-vinnuni á BTÚ, so verður neyðugt, at hesi hagtøl verða roknað og almannakunngjørd so hvørt, soleiðis at øll kunnu síggja, hvønn veg tað ber.

## Spurnakassin

**PANEL**


Niels John Andreasen,
*netumsitari*

*Hava tit ein spurning um telduútbúna (HW) ella ritbúna (SW), hvat tit hava rætt og loyvi til ella okkurt heilt annað, kunnu tit senda tykkara spurning til spurnaðarkassan.*
*Í panelinum at svara spurningum hava vit serkøn fólk at heita á.*
*Sendi spurningin til:*
*sid@sosialurin.fo.*
*Hesaferð svarar Niels John Andreasen, sum arbeiðir sum netumsitari á VIT Sp/f.*

**Spurningur:**
Nú havi eg sæð at Microsoft er komið við einari Windows 2000 útgávu á donskum, sum eg umhugsi at keypa. Eg havi Windows 98 á míni heimateldu. Teldan hevur Pentium 300 Mhz processor og 32 MB RAM. Hvørjar fyrimunir fái eg við at skifta, og eru nakrir vansar? Er neyðugt hjá mær at byggja telduna út?

***Svar:***
*Sum nevnt í grein aðarstaðni, so eru nýggju Windows 2000 útgávurnar enn ikki ætlaðar heimabrúkaranum. Fyri at svara spurningunum, taka vit tískil støði, í at skift verður frá Windows 98 til Windows 2000 Professional.*

*Áðrenn skifti til Windows 2000 Professional, er neyðugt at lúka krøvini, sett til tólbúnaðin. Windows 2000 Professional krevur minst 64MB RAM, so teldan má útbyggjast til minst 64MB RAM.*

*Eisini skal havast í huga, hvat goymslupláss er tøkt og skal vantandi brúkast til annað enn stýriskipanina. Stýriskipanin krevur 650 MB, men ofta gerst reella kravið munandi hægri við tíðini.*

*Fyrimunirnir eru nógvir at heinta við skifti til Windows 2000 Professional og so er eisini oftast við nýggjum útgávum av stýriskipanum ella forritum. Windows 2000 Professional hevur nýggja snøggari brúkaraflatu, eins og nógvar nýggjar funkur eru, sum gera raksturin nógv lættari og tryggari. Skal t.d. nýggjur tólbúnaður tilførast, so er nýggi Plug and Play eginleikin ómetaliga lættur at handfara. Eisini slepst nú undan at 'restarta' eftir at t.d. eitt forrit steðgar at virka, eftir at nýggjur tólbúnaður er tilførdur ella nýggj forrit innløgd.*

*Tað eru tó eisini nakrir vansar við einum skifti av stýriskipan, serliga tá skift verður frá Windows 98, tí nýútkomna Windows 2000 røðin byggir á Windows NT tøkni og tískil kunnu einans brúkast forrit, sum eru Windows NT kompatibul. Mongu forritini, sum heimabrúkarin nýtur í dag, eru serliga ætlað Windows 98 stýriskipanini, so her má brúkarin vera greiður yvir møguligar trupulleikar. Hetta er eisini galdandi fyri møgulig spøl, ið ynski er at brúka framyvir. Ein annar trupulleiki stingur seg upp rundan um tólbúnaðin og drívarar til tólbúnaðin. Windows 2000 røðin inniheldur drívarar til mest brúktu tólini í dag, men tó ikki alt. Útbreiðslan av nýggjum drívarum bøtist við tíðini, men fyribils skal brúkarin ikki vænta stórvegis fyrstu mánaðirnar.*

*Tað er trupult at siga, um tað er ráðiligt at skifta til nýggju stýriskipanina, tí hetta myndast aftur í hvat teldan verður brúkt til dagliga. Nýggja Windows 2000 røðin hevur eina líknandi stýring sum Windows 98 og er eins brúkaravinarlig, so her er munurin ikki tann stóri. Tað er einamest munur á hvørji forrit og hvat tólbúnaður skal brúkast eftir skifti av stýriskipan.*

*Mælt verður tó eisini vanliga til at bíða at skifta stýriskipan, til henda er royndarkoyrd í nakrar mánaðir, hetta er fyri at sleppa undan møguligum barnasjúkum, sum kunnu tarna raksturin.*

*Hevur tú ein spurning til spurnakassan skriva til: sid@sosialurin.fo*


Lesið
sosialin
sosialin
osialin
osialin
-tað
loysir
seg